*Lagt til rættis: Rigmor Dam og Dorit Hansen*
*Myndir: Sunva Lassen*
*Tilfar: Panduro Hobby í 2x3*

# Ull er jóla gull

**Føroysk ull kann brúkast til annað klæði. Far ein túr í hagan við børnunum og samla lesull til ókeypis jólatilfar. Samstundis gjørt tú fuglum og náttúru eina tænastu**



## Jólalig lesull

**Stjørnur: Klipp eina stjørnu úr hørðum pappi. Legg ull um, og heft hana við at vinda reytt tógv um.**
**Kransur: Keyp eitt krans úr bambus. Legg ull um, og heft hana við reyðum tógvi.**
**Bæði stjørnur og kransur eru vælegnað at pynta við úti.**





## Unikir lampuskermar

**Smáu lampuskermarnir eru bundnir úr tvítráðaðum føroyskum tógvi. Kasta 20 eygu uppá stokkar nummar 20 og bind 14 umfør stiklavond. Seyma saman til eitt lítið rør. Drag stáltráð um annan endan, og bind um fatningin á peruni á ljósketuni. Bara hugflogið setur markið. Tú kanst brúka størri stokkar, øðrvísi litir ella annað slag av tógvi. Ljósketur við kámum perum rigga væl, tí perurnar verða ikki ov heitur.**

# Glitrandi glansbíløt

Við glansbíløtum koma bestu barnadagarnir fram í hugan, við vinkonum, fellubókum og litføgrum dósum. Halt lív í barnsliga jólahýrin







## Hjartajól

Hjørtuni eru úr silkipappíri og transparentum nóta- og ríspappíri. Eitt hjarta úr stáltráði við gullperlum kransar vakra einglabílætið.

## Endurvinnið shoppingposan



Posin frá einum herligum shopping-túri í summar er nú umskapaður til fýra vøkur kramarhús. Decouperað við glansibíløtum, lakkað og vundin inn í stál-tráð. Honkin kundi eisini nýtast aftur.



## Decouperað jólapynt

DECOPATCH er heitið á nýggjum slagi av decoupagu. DECOPATCH pappír er lætt at arbeiða við, tí tað er gjøgnumlitað, sterkt og tunt. Her hava vit gjørt eitt lítið skrín og broytt ein gamlan ljósastaka.

